# Ársins Leiðaradagur 2008

- hvat gera hini, hvat kanst tú gera og hvat er best at gera?

25. januar á Hotel Føroyum

## Tað reina sirkus

### *- ella hart arbeiði fyri allar pengarnar?*

25. januar savnast vit aftur til Ársins Leiðaradag. Tað er her, vit dagføra okkara know how innan leiðslu og altjóða rák. Tað er eisini her vit viðlíkahalda ella skapa okkum eitt gott og breitt leiðslunetverk. So ert tú leiðari ella hevur áhuga í leiðslu, eigur tú at tekna teg beinanvegin! Avmarkað pláss.

Høvuðstema á Ársins Leiðaradegi 2008 er um rekruttering og fasthaldan av starvsfólki. Hvat skal til? Hvussu fært tú tey at velja júst tína fyritøku? Hvat krevur nútímans menniskja?

Er tað sirkus, stórar veitslur, uttanlandsferðir, bowling ella tosa vit um spennandi arbeiðsuppgávur, góða løn, viðurkenning og fleksibilitet? Ella kanska ein góður blandaður pakki?

Millum annað hetta, fært tú nøkur góð boð uppá á Ársins Leiðaradegi 25. januar.

Vælkomin



## Á skránni

- ***Andras Róin, Ársins leiðari 2007***
og stjóri á Smyril Line setur dagin

- ***Rekruttering og fasthaldan av starvsfólki***
***v/John Evan-Jones***

John Evan-Jones er best-seller rithøvundur og av mongum sæddur sum evropeiska svarið uppá Stephen Covey. Hann hevur givið út 23 bøkur á donskum, harav tann seinasta "De 12 Universelle Love", longu er vorðin eitt "must". Kom og hoyr hansara vælkvalificeraða boð uppá, hvussu nútímans menniskja raðfestir.

- ***Blue Ocean Strategy***
***v/Poul Kr. Mouritsen, fyrrverandi***
***HR-menningarstjóra í Jyske Bank***

Poul Kristian Mouritsen hevur skrivað bókina "Jyske Bank på det blå ocean - om at gøre en forskel", sum er millum 10 tær best umtóktu leiðslubókunum í 2006 og 2007. Hevur tú ov nógv fokus á tínar kappingarneytar er BOS júst nakað fyri teg.

- ***Live samrøður***
***v/Óluvu Zachariassen***

Óluva Zachariassen, fer at stýra spennandi live samrøðum og kjaki um rekruttering, fasthaldan, útlendska arbeiðsmegi og hvat man skal gera við kværulantin, sum finnst á flest øllum arbeiðsplássum.

Kompetentir persónar við hvøssum meiningum seta dám á kjakið. **Marita Rasmussen**, Vinnuhúsið - **Meinhard Jacobsen**, Føroya Fiskavirking - **Steinbjørn Hardlei**, Eik - **Edvard S. Remberg**, Formula.fo - **Sonja Jógvansdóttir**, Samtak - **Mads Winther**, fyrrverandi rektari í Studentaskúlanum í Hoydølum - **Niels Christian Nolsøe**, Elektron - **Turið Debes Hentze**, advokatur
Harumframt verður politiskt umboð og almennur stjóri við eisini, nøvn seinni.

- ***Trætumekling á arbeiðsplássum***
***v/Turið Debes Hentze***

Trætast tit um eitthvørt og gongur ongan veg? Kanska er trætumekling loysnin. Turið Debes Hentze, advokatur fer at hava viðkomandi fyrilestur um møguleikarnar við trætumekling.

- ***Tilnevn Ársins leiðara 2008***

Vit heita á øll um at tilnevna Ársins leiðara 2008 á www.synergi.fo. Freist: 20. januar 2008. Í dómarapanelinum eru: Óli á Deild Olsen, Vinnuvitan, Gloria Kalsø, Føroya Handilsskúli og Marita Rasmussen, Vinnuhúsið

- ***Ársins virkið 2007***

Eik var kosið Ársins virkið á Vinnudegnum 2007. Umboð frá Eik fer at greiða frá, hvat Eik heldur hevur verið viðvirkandi til, at tey vunnu hendan heiður.

Les meira og tekna
teg á www.synergi.fo
ella ring 22RING (227464)

Synergi